# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Tað tænir ongum máli hjá turkum at bumba í Norðurirak, tá ein ikki veit, hvar fíggindin er*
*(Robert Gates)*

# Á flog við 471 ferðafólkum




*Heimsins størsta ferðamannaflogfar fer í rutu fyri fyrstu ferð*

**Heimsins størsta ferðamannaflogfar fór sína fyrstu rutuferð í morgun**

Við 471 ferðafólkum innanborðs lætti Airbus A380-flogfarið hjá Singapore Airlines sær á av flogvøllinum í Singapore tíðliga í morgun og setti kós ímóti Sidney í Avstralia.

Tað risastóra flogfarið, sum er líka høgt sum ein bygningur í sjey hæddum, er innrættað til vanlig ferðafólk og til teirra, sum hava ráð til at rinda fyri eina marglætisferð í luftini. Eitt nú ber til at keypa ferðaseðil til egið rúm við flatskíggja, song og arbeiðsborði.

Tað elsta ferðafólkið á teirri fyrstu rutuferðini var 91 ár, og tað yngsta var 10 mánaðir. Ferðafólkini høvdu keypt ferðaseðlarnar ígjøgnum eitt uppboð á alnótini, og tey høvdu goldið smáar sjey milliónir krónur fyri ferðaseðlarnar. Singapore Airlines fekk tó ikki nógv burtur úr tí, tí inntøkurnar á teirri fyrstu ferðini fóru til vælgerandi endamál.

# Kyoto stór avbjóðing fyri Grønland

**Grønland hevur bundið seg til at skerja útlátið av CO2 átta prosent, men tað verður trupult**

Tað verður ein ovurstór avbjóðing fyri tað grønlendska samfelagið, um landið skal halda lyftið um at skarva átta prosent av CO2-útlátinum tey næstu fýra árini. Tað kom fram á einari ráðsyevnu í Nuuk fyrr í vikuni, har umleið 80 umboð fyri heimastýrið, vinnulívið og ymsar stovnar luttóku.

Síðani 1990 hevur grønlendska CO2-útlátið verið veksandi, og nú er tað umleið 650.000 tons um árið. Luttakararnir ásannaðu, at tað verður ein ovurstór avbjóðing at røkka tí ásetta málinum, men hildu, at tað fer at bera til at koma væl áleiðis.

Millum hugskotini, sum komu fram á ráðstevnuni, vóru uppskot um at byggja vatnorkuverk og at seta í verk tiltøk, sum skulu eggja fólki til at brúka minni orku. Harafturat varð tosað um at seta serligt avgjald á stórar bilar.

# Kofi Annan riddari

**Fyrrverandi ST-aðalskrivarin Kofi Annan er vorðin bretskur riddari**

Elisabeth bretadrotning hevur tilnevnt fyrrverandi ST-aðalskrivaran Kofi Annan riidara. Tilnevningin merkir, at Annan kann skoyta bókstavirnar GCMG upp í navn sítt, men hann kann ikki kalla seg »Sir«.

GCMG er ein stytting, sum sigur, at viðkomandi hevur fingið St. Michael og St. George-krossin, sum er latin síðani 1818, og sum verður latin kvinnum og monnum, sum hava avrikað okkurt serstakt fyri heimssamfelagið.

Kofi Annan var aðalskrivari í ST frá 1997 til 2007.



*Elisabeth drotning handar Kofi Annan riddarakrossin*

## STUTT SAGT

### Oljumenn druknaðu

Tíggju meksikanskir oljuarbeiðsmenn druknaðu, tá teir í illveðri royndu at sleppa av einum oljupalli í Meksikanska Flógvanum. Veðurmenninir høvdu boðað frá illveðri, og oljufelagið gjørdi av at taka fólkið av pallinum. Tað eydnaðist at taka 58 menn av pallinum, men tá var veðrið vorðið so ringt, at tyrlurnar fingu ikki hjálpt teimum 10, sum vóru eftir. Teir royndu at sleppa frá pallinum við bjargingarflakum, men tað miseydnaðist, og allir doyðu. Harðar hvirlur, ringur sjógvur og grimdarregn forðaðu meksikanska flogvápninum at senda tyrlur at hjálpa monnunum, skrivar AP.

### Bush vil ávirka Kuba

George W. Bush, forseti, heldur, at tað gongur ov seint við at demokratisera Kuba, og tí hevur hann nú lagt fleiri ætlanir um, hvussu USA skal viðvirka til at skunda undir nýskipanir í grannalandinum. Millum annað ætlar forsetin, at USA skal veita demokratiseringsfelagsskapum í Kuba fíggjarligan stuðul, eins og hann ætlar at lata loyva amerikonskum felagsskapum at lata kubanskum skúlum telduútgerð. Samstundis skal hann hava sagt, at hann er sinnaður at stovna ein grunn, sum skal hjálpa kubanum, so skjótt Kuba er vorðið demokratiskt.

### Mismæltur

Mitt Romney, sum roynir at gerast forsetavalevni hjá republikanarunum í USA, var heldur óheppin, tá hann fyrr í vikuni skuldi gera viðmerkingar til ta seinastu bandupptøkuna við Osama bin Laden. Um tað vóru tankarnir, sum órógvaðu hann, er ikki greitt, men í hvussu er kom hann at leggja demokratiska senatorin Barrack Obama undir at hava sagt tað, sum Osama hevði sagt. Heilt ólík eru nøvnini ikki.